# Hjá Simma fæst alt innan tónleik



**Simme er kendur tónleikahandil í Havn, sum veitur tænastur kring alt landið. Og í handlinum eru tey komin í jólahýr og fara at hava live-tónleik undan jólum. Annars fegnast tey hjá Simma um Ukulele-fepurin, sum hevur herjað í ár**

Simme Jacobsen byrjaði Simme Musikkhús í 1959. Síðani hevur fyritøkan verið veitari við tænastu kring alt landið, tá um tónleik ræður. Í 2005 yvirtók Petur Magnus Bjarnastein fyritøkuna. Hann var frammanundan kendur sum guitarbyggjari handan navnið Bjarnastein Guitars.

Fyrr í ár flutti Simme Musikkhús í hølini í Lucas Debesargøtu 8 í Havn, beint við bilstøðina Auto. Hølini eru dupult so stór, sum Simme var í frammanundan,og sjálvsagt eru umstøðurnar harvið nógv betraðar.

– Vit hava alt innan tónleik, guitarar, tummur og annað, sigur Petur Magnus Bjarnastein, sum eisini hevur lagt til merkis, at lítla ljóðførið Ukulele hevur fingið undanvind og hevur av sonnum havt eitt serstakt ár.

Sannur "Ukulele Fepur" ger um seg kring allan knøttin, ja eisini her heima í Føroyum. Nøvn sum: Jake Shimabukuro, Joe Brown, Michael Powers, Brittni Paiva, James Hill og mong onnur stór nøvn gera rættiliga um seg við hesum lítla fitta og glaða ljóðførinum, verður upplýst á heimasíðuni www.simme.fo.

Simme Musikkhús er eisini vorðin MAS dealer fyri Martin guitars, hetta merkir at Simme er sonevnd Martin Aucoustic Shop. Hetta fegnast tey sjálvsagt um hjá Simma.

Úrvalið í handlinum er stórt og yvir 100 ymsir guitarar eru í løtuni í handlinum.

– Vit gera eisini umvælingar og á verkstaðnum er sera nógv at gera, sigur Petur Magnus Bjarnastein.

– Vit eru sjálvsagt komin í jólahýr og í desember verður livandi tónleikur at hoyra í handlinum, men um hetta verður lýst nærri í næstum, sigur Petur Magnus Bjarnastein.

# Hetta er mín jólasangur



GOMUL MINNI

*– Sangurin "Så går vi rundt om en enebærbusk" vekur gomul minni, sigur Dinna Jensen í Runavík*

**Dinna Jensen:**

*Så går vi rundt om en enebærbusk*

- Hetta er kanska ikki mín favorit jólasangur, men tað var hann, eg kom at hugsa um, tá eg fekk spurningin, hvør var mín favoritt jólasangur. Hesin sangur vekir sera góð minnir frá mínum barnaárum, sigur Dinna Jensen í Runavík.

Vit plagdu ofta at fara ein túr yvir um fjørð at vitja fastir okkara, sum var gift á Strondum og átti tríggjar døtur sum vóru áleið á sama aldri sum vit fýra systkini. So tað var altíð stuttligt at vitja familjuna við Sjógv.

Minnist serliga á jólum, at ein maður í grannalagnum, sum vanliga varð róptur Steinur (Steingrím), plagdi at koma inn á gólvið. Tá dansaði hann við okkum børnum um jólatræið, meðan vit sungu "Så går vi rundt om en enebærbusk" og gjørdu teknini til sangin, meðan vit dansaðu um træið. Hetta hildu vit vera sera stuttligt og hugnaligt.

- Tá eg hoyri hendan sangin, fløvar tað mítt hjarta við minnum frá mínum barnaárum, sigur Dinna Jensen.

## *Så går vi rundt om en enebærbusk*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig mandag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi vasker vort tøj,*
*vasker vort tøj, vasker vort tøj,*
*så gør vi såd'n, når vi vasker vort tøj,*
*tidlig mandag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig tirsdag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi skyller vort tøj,*
*skyller vort tøj, skyller vort tøj,*
*så gør vi såd'n, når vi skyller vort tøj,*
*tidlig tirsdag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig onsdag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi tørrer vort tøj,*
*tørrer vort tøj, tørrer vort tøj,*
*så gør vi såd'n, når vi tørrer vort tøj,*
*tidlig onsdag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig torsdag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi ruller vort tøj,*
*ruller vort tøj, ruller vort tøj,*
*så gør vi såd'n, når vi ruller vort tøj,*
*tidlig torsdag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig fredag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi stryger vort tøj,*
*stryger vort tøj, stryger vort tøj,*
*så gør vi såd'n, når vi stryger vort tøj,*
*tidlig fredag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig lørdag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når vi skurer vort gulv,*
*skurer vort gulv, skurer vort gulv,*
*så gør vi såd'n, når vi skurer vort gulv,*
*tidlig lørdag morgen.*

*Så går vi rundt om en enebærbusk,*
*enebærbusk, enebærbusk,*
*så går vi rundt om en enebærbusk,*
*tidlig søndag morgen.*
*Så gør vi såd'n, når til kirke vi går,*
*til kirke vi går, til kirke vi går,*
*så gør vi såd'n, når til kirke vi går,*
*tidlig søndag morgen.*

Gamal sangleikur